Fróðskaparsetur Føroya

1. februar 2011

# Frágreiðing til stýrisfund nr. 4/2010

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Mánadagin 22. november 2010 kl. 09.00-17.00<br>Týsdagin 23. november 2010 kl. 09.00-12.00 |
| Fundarstað: | Setursskrivstovan, J.C. Svabos gøtu 14 |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, næstformaður, Juanna Joensen, Winny í Pætursastovu, Ása Róin, Tove Bull, Johann Jansson Petersen, stýrislimir, Jóan Pauli Joensen, rektari og Rúna Hjelm, fyrisitingarstjóri.<br><br>Jan Mortensen var ikki til staðar undir viðgerðini av máli 1 - 4. Winny í Pætursastovu hevði forfall 23. november, og hon var tí partvís til staðar undir viðgerðini av máli 5. Hugin Skaalum, fíggjarleiðari, var til staðar undir viðgerðini av máli 3 og 4. |

**Dagsskrá:**

1. **Góðkenning av 3/2010 stýrisfundi 9.-10. september 2010.**
Fundarfrásøgn 3/2010 varð góðkend við smærri viðmerkingum.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Dagsskráin varð góðkend.

3. **Fíggjarstatus fyri 2010.** (J.nr. (3) 10-12-20070015).
Fíggjarleiðarin Hugin Skaalum legði fram frágreiðing um fíggjarstatus fyri mánaðirnar januar – september 2010. Niðurstøðan í frágreiðingini er, at játtanin fyri 2010 fyri Fróðskaparsetur Føroya fer at halda, eisini fyri ymisku undirkonturnar.

4. **Bygnaðar- og strategitilgongd.** (J.nr. (3) 10-00-20070013).
Stýrið vísti á, at samanskrivingin av strategiskjølunum var ein roynd at gera eitt skjal, sum er hóskandi yvirskipað at fata um virksemið á Fróðskaparsetrinum. Stýrið hevur frá byrjan gingið út frá, at deildirnar skulu orða virkisætlanir við støði í tí yvirskipaða skjalinum. Tískil hevur stýrið lagt til grund, at meginparturin av stóra arbeiðinum, sum deildirnar løgdu í strategiarbeiðið seinasta vetur, ikki hevur verið til fánýtis.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

Nakrar megindeildir hava gjørt viðmerkingar til strategiskjalið. Við støði í teimum ásannar stýrið, at viðurskifti í skjalinum mugu takast upp til endurskoðan, og samstundis verður neyðugt at greina neyvari og greiða frá, hvussu stýrið hevur fatað hetta skjalið, sum er eitt yvirskipað strategiskjal, sum seinni verður fylgt upp við nærri ásetingum fyri hvørja deild sambært brotinum frammanfyri.

Stýrið heitir tí á rektaran og fyrisitingina um at styrkja samstarvið og kunningina á Setrinum, millum annað við javnan at skipa fyri dekanfundum, og við at rektarin sendir kunning um strategitilgongdina út til øll starvsfólk á Setrinum.

Stýrið er samt um, at eitt av endamálunum við bygnaðarbroytingunum er at bróta niður girðingar millum deildirnar á Setrinum. Samstundis skal berast so í bandi, at tað ikki verða fleiri stig í bygnaðinum, enn tað eru í dag. Stýrið hevur greitt ynski um eitt Fróðskaparsetur, ið samvirkar meira og tættari, enn gjørt verður í dag, m.a. fyri lættari at skipa fyri nýggjum útbúgvingum, sum byggja á førleikar á ymisku deildunum.

Stýrið hevur umrøtt bygnaðin á fleiri fundum, og serliga hevur verið hugt eftir møguleikunum fyri annaðhvørt at menna ein bygnað uttan megindeildir ella at skipa tvær megindeildir.

Í heyst hevur verið hugt neyvari at møguleikanum fyri at hava tvær megindeildir. Stýrið tók avgerð um at arbeiða víðari við hesum møguleikanum. Somuleiðis varð avrátt, at uppskotið um bygnað skal sendast deildunum í hoyring, tá ið tað er nakað meira nágreinað.

Annars vórðu hesi viðurskiftini umrødd í sambandi við komandi bygnaðin: Við hvørja megindeild verður ein dekanur settur í eitt fulltíðar leiðslustarv. Tað verður bert ein fyrisitingarlig eind á hvørjari megindeild. Hvør megingdeild hevur eitt lestrarráð við umboðum fyri flest fakøki á deildini. Hvørt fakøki á megindeildini hevur eina fakliga leiðslu. Faklig leiðsla verður partur av starvinum hjá vísindafólkum á deildini. Undirvísingarleiðarar verða settir eftir tørvi. Fyrisitingarligar uppgávur verða miðsavnaðar fyri at tryggja samvirkni ella synergi og fyri at fáa burtur dupultvirksemi. Stýrið vil hava, at uppskot til praktiskar loysnir skulu henda í samstarvi við dekanarnar til tess at fremja ætlanina við tveimum megindeildum. Rektarin fær til uppgávu at samskipa hesa broytingina saman við dekanunum.

Rektarin legði fram reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya, og stýrið hevði ymiskar viðmerkingar, sum verða settar inn í skjalið. Avgjørt varð at nýta hesi starvsheiti fyri lærarar/vísindafólk á setrinum:

Føst størv: Professari, lektari og námslektari
Tíðaravmarkaði útbúgvingarstørv: Setursløntur adjunktur og vanliga uttanseturslønt Ph.D.-lesandi og post doc.-granskarar
Tíðaravmarkað parttíðar vísindalig undirvísingarstørv: Adjungeraður professari, adjungeraður lektari og adjungeraður námslektari.

Uppskot til reglugerð við nærri ásetingum verður send stýrinum við rættingunum eftir fundin.

Sissal Kristiansen og Jenny Kjærbo frá Sendistovuni løgdu fram uppskot um sniðleist fyri Fróðskaparsetur Føroya. Stýrið helt hetta vera áhugaverd uppskot og hevði uppskot um broytingar í sniðunum. Avtalað varð, at fyrisitingarstjórin skuldi senda dagførd uppskot til stýrislimirnar eftir fundin. Avgjørt varð eisini, at fyrisitingarstjórin skal senda innkalling til bólkin, sum hevur arbeitt við virðunum, til kunnandi fund um virðir fyri Fróðskaparsetrið.

5. **Felags lestrarbyrjan og longd á lestrarhálvum.** (J.nr. (3) 10-40-20070041).
Fyrisitingarstjórin greiddi frá, at rektarin og hon høvdu kallað inn til dekanfund fríggjadagin 19.11.2010, har millum annað felags lestrarbyrjan og longd av lestrarhálvu vóru á skránni.

Á fundinum kom fram, at á SSD, FMD og SRFS byrjar heysthálvan síðst í august ella fyrst í september (í viku 35) og endar við próvtøkum í januar (viku 3), meðan várhálvan byrjar síðst í januar ella fyrst í februar (vika 4/5) og endar við próvtøkum í juni (vika 23/24).

Dekanurin á NVD greiddi frá, at lestrarhálvurnar eru býttar sundur í tveir blokkar við tveimum 7,5 ECTS-skeiðum í hvørjum blokki. Heysthálvuna eru próvtøkurnar í viku 42 (beint eftir heystfrítíðina) og í viku 50/51, soleiðis at allar próvtøkur eru lidnar fyri jól. Fyri at fáa hetta at ganga upp, byrjar heysthálvan á NVD í viku 34 (um 23. august). Serliga er væl dámt av bæði lærarum og studentum, at allar próvtøkurnar eru avviklaðar fyri jól. Undirvísingin fyri várhálvuna byrjar í viku 2, soleiðis at pláss er fyri møguligum endurpróvtøkum í viku 1. Í várhálvuni eru aftur tveir blokkar, og próvtøkur í viku 6 og viku 18/19. Møguligar endurpróvtøkur eru so fram til juli. Hann segði eisini, at hetta er ein skipan, sum nú er innkoyrd og riggar væl, og sum hann ikki vil ráða til at broyta.

Rekarin á Læraraskúlanum hevur í t-brævi dagfest 19.11.2010 grundgivið fyri, at Læraraskúlin skal hava somu lestrarbyrjan og longd á lestrarhálvu sum í dag. Millum annað sigur hann:

"Tað hevur verið soleiðis, at lestrarárið á Læraraskúlanum altíð hevur fylgt skúlaárinum soleiðis, sum tað er í fólkaskúlanum. Hetta eru tað fleiri orsøkir til, eitt nú er tað týdningarmikið í sambandi við starvslæruna.

Í nýggju útbúgvingunum er tað soleiðis, at lesturin er 60 ECTS um árið ella 30 ECTS fyri hvørja lestrarhálvu. Arbeiðsbyrðan fyri eitt ECTS er ásett at vera 26-27 tímar um vikuna. Hjá okkum verður roknað við 1,5 ECTS um vikuna. Tað vil við øðrum orðum siga, at arbeiðsbyrðan hjá teimum lesandi verður roknað til 1,5 x 26-27 tímar ella 40 tímar um vikuna. Miðalaldurin á teimum, sum byrja lestur her á staðnum, er umleið 28 ár. Tað vil siga, at nógv teirra hava ábyrgd í familju, og harvið ber tað ikki til at rokna við, at tey vanliga brúka meiri tíð enn normala arbeiðsviku upp á lesturin.

Í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og AKF verður sagt soleiðis um arbeiðstíðina á Føroya Læraraskúla:

§ 21. Arbeiðstíð á Føroya Læraraskúla
Ársnormurin er 744,23 tímar um árið, roknað soleiðis:
Ársnormur=40/40 * 19 * 39,17
Stk. 2. Lærara verður veittur ein frítíðarreduktiónssatsur uppá 0,42 tímar um vikuna.

Hetta eru argumentini fyri, at vit ikki halda tað vera ráðiligt at broyta lestrarárið frá tí, sum tað nú er."

Avgerð:
Stýrið er samt um, at rektarin kallar dekanarnar inn til fundar um felags lestrarbyrjan og longd av lestrarhálvum. Á hesum fundi skulu rektari og dekanar gera eina semju um málið, og ein avgerð skal takast áðrenn 1. januar 2011.

6. **Innanhýsis samstarvsnevnd. Áheitan á stýrið frá álitisfólkum Starvsmannafelagsins um at skipa eina samstarvsnevnd, har leiðsla, álitisfólk og varaálitisfólk sita.** (J.nr. (3) 10-01-20070036).
Stýrið tekur undir við, at ein samstarvsnevnd verður stovnað fyri Fróðskaparsetur Føroya. Stýrið metir, at ikki er neyðugt við fleiri enn seks persónum í samstarvsnevndini, við eins nógvum limum frá leiðslu og umboðum fyri starvsfólkini. Stýrið heitir á fyrisitingina um at kalla álitisfólkini á Setrinum inn til samstarvsfund, og at arbeitt verður víðari við málinum.

**Kunning:**

7. **Kunning um starvsfólkamál.** (J.nr. (3) 10-22.04-20070023).
Fyrisitingarstjórin kunnaði um trý starvsfólkamál, sum arbeitt verður við í løtuni.

8. **Kunning um nýggj starvsfólk á Fróðskaparsetrinum**
Fyrisitingarstjórin kunnaði um nýggjar starvssetanir.

9. **Vegleiðing fyri vali av starvsfólki og lesandi í stýrið.** (J.nr. (3) 10-00-20070018).
Vegleiðingin, sum var góðkend á seinasta stýrisfundi, er send Mentamálaráðnum við minni tilráðingum til endaligar góðkenningar. Fyrisitingarstjórin kunnaði stýrið um, at ein fulltrúi í Mentamálaráðnum hevði greitt henni frá, at Ph.D. lesandi á Setrinum mest sannlíkt ikki kunnu flytast til starvsfólkabólkin, tí ásetingar hjá Mentamálaráðnum siga, at tað bert eru starvsfólk í føstum starvi, sum hava valrætt. Stýrið tók hetta til eftirtektar.

10. **Val av studentaumboði í stýrið fyri 2011.** (J.nr. (3) 10-01-20070037).
Fyristiginarstjórin kunnaði um, at orsakað av einum fyrisitingarligum mistaki er avgjørt at skipa fyri nývali av studentaumboði í stýrið fyri 2011.

11. **Kunning frá stýrisformanninum um fund við landsstýriskvinnuna.**
Stýrisformaðurin kunnaði um fund, hann hevði við landsstýriskvinnuna 9. november. Málini á skránni vóru hesi:
    - Starvsfólkamál á Setrinum
    - Nýtt uppskot til málráð
    - Nýggjur rektari á Setrinum
    - Status viðvíkjandi bygnaðar- og strategitilgongd
    - Fundarfrásøgn um fjarundirvísing
    - Granskingarpolitikkur
    - Akkreditering/eftirmeting av Fróðskaparsetrinum
    - Granskingarpark

12. **Ymiskt - m.a. áseta næsta stýrisfund**
Stýrisfundirnir á vári 2011 verða tórsdagin 3. mars kl. 9.00-17.00 og mánadagin 30. mai 2011 kl. 9.00-17.00.

JPJ/RH